dag als ikki eru liberalt ugsandi — við snildi og lugnaskapi at júka fyri ólki, at hesin politikkur r bert fjant og fjas og eruleikafjarur.

### Samfelagið fyri øll

Hóast hildnir fyri spott, o høvdu teir fyrstu osialistarnir dirvi til at rbeiða fram ímóti tí sam-elag, teir trúðu á. Teir øvdu eisini dirvi til at ugsa um, hvussu hetta í oynd og veru kundi skap-st og at virka fyri at gera að til veruleika.

Teir høvdu dirvi til at ísa á skeivleikar í sam-elagnum, ið tá var. Teir ístu á leiðir til sam-elagið, har felagsskaps-ankin við medmenniskj-ni sum miðdepli, var tað erandi í stríðnum fyri at urturbeina sosialt og bú-skaparligt illgras og geva næstanum menniskjans-ig kor.

Samfelagið, har eisini in kristni næstrakær-eikstankin var grund-sjónarmiðið, og har alt: evni, arbeiði og fram-leiðsluamboð, arbeiddu fyri heildini.

Samfelagið, har eingir einstaklingar ella ein-stakir bólkar áttu ser-rættindi, sum kostaðu heildini nakað.

Hetta er í stuttum gamla grundarlagið, men tað er haldgott enn í dag.

### Leiðin er samráðingar-politikkur

Onkur vil vera við, at vit eiga at venda aftur til hetta grundarlagið og uppgeva allan samráðing-arpolitikk. Bert arbeiða út frá hesum og ongantíð rætta okkum eftir ynski veljaranna, bert fyri at tekkjast teimum í løtuni. Ongantíð gera semju við mótstøðufólk, ið kunnu fáa okkum av leiðini, um tað so bert er fyri eitt stutt skifti. Tí sosial-isman er andstøðukend og vil ongantíð finna seg í tí sum gongur heildini ímóti, hvørjum tað so kemur frá; fakfeløgum, starvsmanna-feløgum, tænastumanna-feløgum, arbeiðsgevarafe-løgum ella øðrum bólkum, sum kunnu trýsta sam-felagið.

Sosialisman, sum ikki er bangin fyri at finna rótina hjá illgrasinum, kann ikki bliva annað enn skapandi í gerandispolitikkinum. Heldur enn at fylgja ynskjum bólkanna, skal sosialisman ala fjøldina upp til at skilja, hvat politiskt og sosialt byggir upp ein sannan medmenn-iskjaligan felagsskap.

At sosialdemokratiið ikki skal lata seg trýsta burtur frá heildarinnar gagnsmálum, kunnu øll verða samd um. Men tá sagt verður, at ongar semjur skulu gerast, so kunnu sosialdemokratar — javnaðarfólk — ikki taka undir við tí. Tað skerst ikki burtur, at tað arbeiði javnaðarfólk kring heimin — tey veri seg meira ella minni sosialist-isk — hava fingið á skaftið júst gjøgnum ein samráð-ingarpolitikk, sum við jøvnum millumbilum førir eitt fótafet á sosialistisk-ari leið, hvur skapt stór framstig, til største bata fyri fjøldina. Men stavn-haldið skal sjálvandi vera óheft av bólkatrýsti. Fólk-ið skal á demokratiskan hátt velja sítt stýri.

### Aðalkjarnan í javnaðar-politikkinum

Sum nevnt er grundarlagið enn haldgott, um amboðini ikki eru tey somu. Fyritreytirnar eru heldur ikki tær somu, tí nógv av tí teir fyrstu sosialistarnir spáddu, hvur søgan prógvað var skeivt. Eisini hvur søgan broytt ta samfelagsmynd, sum Karl Marx setti upp. Men at sjálv aðalkjarnan í javn-aðarpolitikkinum enn er tað, sum sosialistiski internationali setti sum ideologiskt grundstøði, kann eingin ivi vera um.

Um tað grundarlagið, sosialistiski internationali varð endurreistur á, kann sigast:

### Kapitalisman hvest stættastríðið

Hóast tað ikki skerst burtur, at hin kapitalist-iska skipanin ella liberal-isman síðan 19. øld hevur skapt ómetaligar framleiðandi kreftir, so er samstundis stórur meiri-luti av borgarum skerdur frá at hava nakra ávirkan á framleiðsluna. Kapital-isman setti ognarrættin yvir mannarættindini. Hon skapti eina nýggja stætt av ognarleysum, uttan sosial rættindi. Hon gjørdi stættastríðið hvassari.

Hóast heimurin eigur nóg mikið til eina sømiliga tilveru fyri øll, so hevur kapitalisman ikki verið før fyri at nøkta ta mest grundleggjandi trongd og tey mest einføldu krøv hjá fjøldini.

Hon hevur ongantíð víst seg føra fyri at virka í longdini, uttan kreppur og arbeiðsloysi. Hon framdi sosialan ótryggleika og ein risastóran mun millum rík og fátæk. Eisini nýtti hon imperialistiska vald-tøku, neyðtøku og hjá-landaeyðræning, og hvesti soleiðis stríðið mill-um tjóðir og fólkasløg. Í summum londum hjálptu sterkir kapitalistiskir bólkar nasismuni og fasismuni á føtur.

### Sosialisman er fyri øll — eingin undantikin

Tá sosialisman kom fram í Europa, var tað fyrst sum ein mótmælisrørsla. Mót-mæli móti øllum tí, tað kapitalistiska samfelagið bar í sær. Tá vóru tað arbeiðararir, sum vóru ringast fyri. Tí vaks sosialisman fyrst sum ein arbeiðararørsla, men síðan gjørdist greitt fyri fleiri og fleiri borgarum: tæn-astumonnum og starvs-monnum, bøndum og fiskimonnum, handils- og handverksmonnum, lista- og vísindamonnum, at sosialisman eigur lykilin, eisini til framtíð teirra. Sosialisman vendir sær tí til øll, sum hava ta áskoð-an — sannføring — at eitt menniskja ikki kann nýta ella eyðræna eitt annað menniskja.

### Sosialisma vil frígera fjøldina

Sosialisman roynir at frí-gera fjøldina frá tí minni-luta, sum ræður framleiðsluamboðunum. Hon vil geva fjøldini sum heild, medavgerðarrætt og vil fáa til vega eitt samfelag, har fræls menniskju ar-beiða saman sum javnlíkar.

Sosialisman er nú ein høvuðstáttur í veraldar-politikkinum. Hon er ikki propaganda, men roynd í praktiskari virkan, hevur í gerandislívinum umframt avreksverk.

Í summum londum er støðið til eitt sosialistiskt samfelag lagt, og eru her liberalismunnar illgras við at hvørva, meðan samfe-lagið hevur útviklað nýggja megi. Sosialism-unnar hugsjónir hava víst teirra virði í royndum.

### Planøkonomi

Í nógvum londum, verður kapitalisman, sum hevur fingið ov fríar teymar, skúgvað til víks. Í staðin verður sett ein búskapar-hugsan, har almenn tiltøk, almennur ognarrættur, al-ment eftirlit, skerkjir kapitalismunnar ræsa-rúm. Fleiri og fleiri mennniskju viðurkenna, at tað er neyðugt við sam-felagsplanlegging — plan-økonomi. Sosialur trygg-leiki, fræls fakfelagsrørsla og vinnuligt demokrati, vinna meira og meira fram.

Henda framgongd stav-ar fyri ein stóran part frá sosialismunnar og fak-felagsrørslunnar stríði gjøgnum nógv ár. Alla-staðni har sosialisman er sterk, eru týdningarmikil stig tikin til skapanina av einum nýggjum sam-felagshátti.

### Sosialisman virðis-mikil í stríðnum fyri tjóðskaparligum frælsi

Seinastu árini eru fleiri av londunum í triðja heim-inum komin fram til, at sosialisman er ein virðis-




**Sosialistarnir vildu hava eitt samfelag, har øll ar-beiddu sum javnlíkar. Her letur ein franskur bóndi aðalsmanninum pening og part av framleiðsluni. Undir fótinum hjá aðals-manninum stendur: »Aðalsmaðurin er eitur-koppurin og bóndin flug-an«**

mikil hjálp í stríðnum fyri tjóðskaparligum frælsi og betri livikorum. Út frá teirra fortreytum koma fram ymsir hættir av demokratiskari sosial-ismu.

Í hesum londum berjist sosialisman ímóti einum innlendskum búskaparligum skrivstovuveldi og ímóti eyðræning av fremmandum imperialist-um og ímóti útaman av fremmandum stórkapital-istum. Her, sum aðra-staðni, berjast sosialist-arnir fyri politiskum og figgjarligum demokratii. Her royna tey at bøta livi-kor fólksins við at fremja búnaðarábøtur og ídnaðarútbygging. Í mongum førum verður hetta gjørt við at víðka al-menna ognarrættin ella við samarbeiði, bæði á framleiðsluøkinum og brúkaraøkinum.

### Kommunisma — ein følsk sosialisma

Meðan sosialisman gong-ur fram allastaðni, eru nýggjar kreftir komnar fram. Hesar kreftir eru stórir vandar fyri hesa rørslu fyri frælsi og sosialum rættvísi. Síðan bolchevisman tók seg fram í Russlandi, hevur kommunisman spjatt hina internationalu arbeiðara-rørsluna og hevur harvið í mongum londum seinkað fremjanini av sosialism-uni í longri áramál.

Falskliga ger kommun-isman krav uppá at eiga lut í sosialistiskum síðaarvi. Veruliga hevur hon avskeplað og rongt henda síðaarv, so hann ikki kennist aftur. Kommun-isman hevur uppbygt eina stranga ideologi — religión — sum ikki kann sammetast við marxism-unnar kritiska hugsunnar-hátt.

### Kommunisma — ein nýggj imperialisma

Meðan sosialistarnir royna at skapa frælsi og rættvísi, við at taka burtur ta eyðræning, sum skilir menniskjuni undir kapitalismuni og liberal-ismuni, so royna kommun-istarnir at hvessa stætta-munin. Hetta gera teir við eittans endamáli: at fremja eitt einflokka eina-ræði.

Hin internationala kommunisman er reið-skapur hjá eini nýggjari imperialismu. Allastaðni, har hon hevur fingið vald-ið, hevur hon oyðilagt frælsið ella møguleikan at vinna frælsi. Hon er bygd á eitt hernaðarligt skriv-stovuveldi og eina harð-renda løgreglu.

### Kommunisma fremur stættamun

Við teimum skerdu møgu-leikum til vælferð, fólkið í kommunistiskum londum hevur, skapar kommun-isman stættamun, eins og kapitalisman. Í komm-unismunnar búskaparligu skipan hevur t.d. tving-silsarbeiði altíð havt ein stóran leiklut eins og tað ikki hevur verið fritt ar-beiðsval.

### Sosialisma gevur fólki fríar ræsur

Sosialisman er ein altjóða rørsla. Hon krevur ikki at øll hava somu fatan — somu meining.

Um sosialistar so byggja sína hugsan á marxismu, ella á annan hátt ynskja at lýsa samfe-lagið, ella teir lata seg leiða av religiøsum ella humaniterum meginregl-um, so arbeiða allir fram móti sama máli: Sosialum rættvísi, betri livikorum, frælsi og veraldarfriði.

### Tørvur menniskjans er avgerandi

Framgongdin innan vís-und og tøknifrøði hevur givið menniskjuni øktar møguleikar, bæði til at gera síni kor betri og til at oyðileggja seg sjálvan. Av hesi orsøk ber ikki til at lata fríum búskaparligum kreftum framleiðsluna upp í hendi. Hon má plan-leggjast systematiskt, so-leiðis at tørvur menniskj-ans er avgerandi.

Sosialisman teggjar saman frælsi og planlegg-ing, bæði á nationalum og internationalum økjum.

### Sosialisman verður ikki smoygd niður yvir fólk

Sosialisman kemur ikki av sær sjálvum. Hon krevur persónliga luttøku av øll-

Framhald á síðu 12